# r úr øskudunga

**FAKTA EINAR MÁR GUÐMUNDSSON**

**Føddur:** 18. september í 1954 í Reykjavík.
**Bókmentir:** Hann hevur skrivað skaldsøgur, stuttsøgur og yrkingasøvn síðan 1980. Bókina "Hvítbókin - kreppan í Íslandi" gav hann út í 2009. Hon er ein hvøss viðmerking um fíggjarliga skrædlið í Íslandi.
**Virðisløn:** Í 1995 fekk hann norðurlendsku bókmentavirðislønina fyri skaldsøguna "Alheimsins einglar."

Einar Már Guðmundsson hevur fleiri ferðir verið í Føroyum og kennir nógvar føroyingar.

## Ísland í tølum

- Millum 7. og 9. oktober 2008 gav fíggjarkreppan Landsbanka Íslands, Glitnir og Kaupthing banahøgg, og íslendska ríkið yvirtók bankarnar
- Fíggjarjavnin hjá bankunum var 10-12 ferðir størri enn bruttotjóðarúrtøkan hjá Íslandi, sum í 2007 var 64 mia. kr.
- Javnin hjá bankunum faldaðist fyri skrædlið 20 ferðir í sjey ár, og vøksturin varð fyri tað mesta fíggjaður við útlendskum lánum
- Íslendska ríkið hevur átikið sær fíggjarligar skyldur á millum 65 og 85 mia. kr. og mátti tí biðja IMF og fleiri lond um hjálp
- Føroyar hava lænt Íslandi 300 mió. kr. Lánið munar ikki nógv, men hevur vakt størst ans í Íslandi, tí tað kom fyrst
- Í 2009 fall bruttotjóðarúrtøkan hjá Íslandi við 9,1 prosent

*Kelda: www.um.dk <http://www.um.dk> og onnur*

» Ríkmenn hava strokið runt í privatflogførum og kappast um alt møguligt fjas. Bólkar sum Duran Duran hava spælt til teirra nýggjársveitslur, og Elton John sang á teirra føðingardøgum

"Fólk eru málleys av tí gramni, sum ráddi í teirri samansoknu fíggjarskipanini. Til dømis hava fleiri av teimum íslendsku fíggjarfúrstunum verið at síggja á listum yvir heimsins ríkastu fólk. Teir hava strokið runt í privatflogførum og kappast sínámillum um alt møguligt forfeingiligt fjas. Bólkar sum Duran Duran hava spælt til teirra nýggjársveitslur, og Elton John sang á teirra føðingardøgum."

Eisini forsetan á Bessastøðum høvdu útrásarvíkingarnir í sínum parti, skrivar hann. Forsetin fór við teimum um meginpartin av klótuni bara fyri at síggja ein fótbóltsdyst, og í røðum rósti hann ríkmonnunum fyri teirra mót og samanbar teir við hetjur. At funnist eigur at verða at forsetans leikluti, fingu íslendingar váttan um herfyri, tá serlig kanningarnevnd staðfesti, at hann hevði moralska ábyrgd av skrædlinum.

### Allir flokkar sviku

Politisku flokkarnir fáa eisini av at vita frá Einari Már Guðmundsson. Leiðararnir í sosialdemokratiska flokkinum, Samfylkingini, endaðu sum búktalarar hjá kapitalismuni, sigur hann. Samfylkingin var meira høgravend enn vinstravend. Øll eftirapanin eftir høgrasnaringini hjá Tony Blair hevði við sær, at flokkurin misti sambandið við sína upprunastevnu, ið var at verja tey minni mentu og arbeiðsfólkið.

"Hendan gongdin gav talsmonnunum fyri kapitalismu og liberalismu fullkomnan frið og óavmarkað albogarúm at gera, sum teimum lysti. Nakrir av leiðarunum í Samfylkingini hava hálovað ríkmonnunum, stuðlað teimum í teirra sjálvgóða grenji og gjørt tað til sín politikk, at ríkmennirnir skuldu sleppa at ráða yvir øllum, eisini fjølmiðlunum," skrivar hann.

Aðrir flokkar fáa av somu skuffu, serliga Sjálvstæðisflokkurin og Framsóknarflokkurin, sum settu fíggjarævintýrið í gongd fyrst í hesi øldini, tá íslendsku bankarnir vórðu privatiseraðir. Ein av høvuðsmonnunum í hesi gongd var Davið Oddsson, ið var forsætisráðharri, tá privatiseringarnar vórðu framdar, og seinni gjørdist tjóðbankastjóri.

"Ríkmonnunum tørvaði ein fígginda, og hann funnu teir í Daviði Oddsson. Baugur-menninir hava givið Daviði Oddsson skyldina fyri fíggjarkreppuna og ótálmað brúkt sínar fjølmiðlar til hetta endamál. Davið Oddsson hevur ákært teir fyri gramni og korruptión og brúkt allar sínar oratorisku gávur til at fáa teir at síggja út sum idiotar," skrivar Einar Már Guðmundsson.

Valgerður Sverrisdóttir, ein av leiðarunum í Framsóknarflokkinum og fyrrverandi ráðharri í bankamálum, sleppur heldur ikki undan. Hon segði, tá bankarnir vórðu privatiseraðir, at talan var um eitt sera stórt framstig, tí talan var um størstu privatiseringar í søgu Íslands. Um onkur hættaði sær at tala at gongdini, fór hon bara at brúka seg.

"Øll, sum talaðu at, vórðu mistonkiliggjørd. Annaðhvørt vórðu tey løgd undir at vera øvundsjúk ella gamaldags. Hesir báðir flokkarnir, Sjálvstæðisflokkurin og Framsóknarflokkurin, hava høvuðsábyrgdina av skipanini, og grundina undir skipanina løgdu teir við gávukvotuskipanini í fiskivinnuni, har møguligt gjørdist at selja fisk, sum enn ikki var fiskaður, og skapa sær eitt privat ríkidømi gjøgnum fólksins ogn," skrivar hann.

### Ríkmaður angrar onki

Stjórin í Baugi, sum nú er farið á húsagang, Jón Ásgeir Jóhannesson, verður eisini nógv umrøddur í bókini. Hann verður lýstur sum ein, ið als onki hevur angrað og enn minni hevur viljað viðurkent, at atferðin hjá ríkmonnunum var skeiv.

"Hesin maðurin stendur treiskliga fast við, at tá teir ikki longur kundu fáa lán til sítt vitloysi, og alt steðgaði upp, ja, so hevði Davið Oddsson, tjóðbankastjóri, alla skyldina. Tú kundi freistast at hugsað, at Jón Ásgeir vaks upp við síni heilt serligu útgávu av Dávids-sálmunum, so nógv sum hansara hugsunarháttur melur um Davið," skrivar Einar Már.

Íslendski rithøvundurin heldur, at ríkmaðurin brúkar sama hátt at grundgeva sum fulli bilførarin, ið sigur, at tað er heilt í lagi at koyra fullur, so leingi tú ikki verður tikin, og um tú so koyrir á ein steyra, hevur steyrin ábyrgdina. Tann síðsti bankin, sum ikki vildi læna mær pengar, var orsøkin til, at eg fór á húsagang, sigur Jón Ásgeir Jóhannesson í veruleikanum.

"Skulu vit tíma at lurta eftir tílíkum tvætli," spyr Einar Már Guðmundsson. "Um eg skyldaði Jón Ásgeir nógvar milliónir, vildi hann so lænt mær uppaftur fleiri milliónir? Skuldin hjá bankunum og feløgunum var heilt einfalt vorðin so stór, at roknistykkið gekk ikki upp. Tí eru vit vorðin troytt av at hoyra sovorðið møsn," skrivar hann.

Hann ynskir eisini løgregluni til lukku við, at tað eydnaðist henni at seta á stovn eina heilt serliga deild at basa ófriði, tá mótmælini vóru upp á tað mesta í Íslandi, samstundis sum hon spardi á deildini fyri fíggjarligan kriminalitet. Speiskliga flennur hann at, at løgreglan var ógvuliga nær við at senda boð eftir brynjaðum manningarvognum úr Danmark í sambandi við mótmælini.

"Týðiligt er, hvønn myndugleikarnir vilja verja, men at vit eru um at missa landið av hondum, at søgan um lýðveldið, sum varð stovnað í 1944, kanska endar her, bara tí nakrir spekulantar fingu alt ov leysar teymar, er so syrgiligt, at tað er at gráta um. Eg havi sett stóran prís upp á okkara fólkaræði og stoltleikan um sjálvstøðuna, og eg haldi, eg fari at sakna tey," skrivar Einar Már Guðmundsson og skírir at enda atburðin hjá politikarum, bankafólkum og ríkmonnum óviljað landasvik.